# øll við



og fleiri góð tiltøk fara eisini at vera á skránni har. Beint áðrenn kappróðurin leygardagin fer Mina Reinert at seta stevnuna á Stakka, og leygarkvøldið verður midnáttarsamkoman eisini á skránni her. Sunnudagin verður harafturat eitt stuttligt tiltak á staðnum. Tá verður ein sokallaður fólkafundur, og tað er Petra Joensen úr Gásadali, sum fer at hava fundin, sigur Gitta.

### Trøllapætur í skúlagarðinum

Leygarkvøldið kunnu børn úr øllum Føroyum føla seg vælkomin niðan í skúlagarðin í Sørvági, tí tá fer Trøllapætur nevniliga at undirhalda.

- Vit hava fingið Trøllapætur at koma ein túr á vestanstevnu í ár, og hann fer at undirhalda í skúlagaðrinum kl. 19.00 leygarkvøldið. Tá Trøllapætur er liðugur á pallinum, fer Brandur Enni at spæla nøkur løg. Til allar síðst fara Boys in a Band at undirhalda á pallinum í skúlagarðinum, sigur Gitta av Kák.

Tað vera tó eisini onnur spennandi tiltøk á skránni leygardagin umframt kappróðurin. Millum annað verður ein forvitnisligur fótbóltsdystur á skránni niðri á vøllinum kl. 18.00, tá Sambaboys, sum er eitt samansett lið av brasiliumonnunum, fer at spæla ímóti einum samansettum liði av leikarum úr Vágum.

### Indianarabýur til børnini

Tað er ikki heilt vist, at Boys in a Band verður síðstu bólkurin, sum fer at undirhalda í skúlagarðinum leygarkvøldið. Um veðrið er til vildar, so er ætlanin at hava ein stóran dans í skúlagarðinum fyri tey ungu, og tá vera tað aftur Holgar & Villmenn, sum fara at spæla. Hetta er tó bert, um veðrið er til vildar.

Ananrs verður eisini nógv spennandi og hugnaligt á skránni niðri við fótbóltsvøllin sunnudagin, sigur Gitta av Kák.

- Vit hava roynt at gera okkurt spennandi niðri við vøllin sunnudagin. M.a. er ein indianarabýur fyri børnini, har ponyríðing verður á skránni, tey kunnu grava eftir gulli, fáa andlitsmáling, og so vera eisini ymsar kappingar á skránni. Harafturat verður vestanstevnukaffi við eini stórari køkukapping á skránni í SÍ-húsinum, og á økinum oman fyri fótbóltsvøllin fer MC-felagið at vísa fram motorsúkklur.

Hetta er bert ein stuttur samandráttur av tí, sum er á skránni. Vestanstevnan hevur nevniliga nógv annað at bjóða, og um fólk eru áhugaði, so er at fara ein túr vestur.

## Gjørt nýggjan drátt

**Sørvingar hava rættiliga fyrireikað seg til sætta FM-róðurin í ár. Teir hava nevniliga gjørt ein nýggjan drátt, so tað verður lættari hjá kappróðrarfólkunum at fáa bátarnar í land**

VESTANSTEVNA

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Sætti og næstseinasti kappróður á árinum verður á skránni leygardagin, og her er als ikki óhugsandi, at fleiri FM-vinnarar fara at vera funnir. Og sørvingar hava so sanniliga gjørt sítt til at fríðka um fjørðin og bygdini, har teir so eisini hava gjørt klárt til komandi kappróðurin.

Kommunan hevur nevniliga gjørt ein spildurnýggjan drátt úti á endanum á keiini, so tað verður lættari hjá kappróðrarfólkunum at draga bátarnar í land. Drátturin er bæði stórur og breiður, og eingin ivi er um, at hetta fer at lætta um hjá helst útlúgvaðu kappróðrarfólkunum.



*Sørvágs kommuna hevur gjørt nýggjan drátt uttarlaga á keiini fyri at bøta um umstøðurnar hjá kappróðrarfólkunum at koma í land aftur*

*Mynd: Teitur Joensen*

## Vakra økið mitt í bygdini

**Neyst og onkur smærri hús mitt í Sørvági eru fyri stuttum síðani brotin niður. Úrslitið av hesum er vakra staðið á Stakka, sum m.a. fer at vera karmur um setanina, midnáttarsamkomuna og fólkafundin**

VESTANSTEVNA

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Mitt í Sørvági er eitt sera vakurt øki við hvítum smásteynum og vøkrum blómum rundan um. Hetta staðið verður nevnt á Stakka, men staðið hevur ikki altíð verið so vakurt, sum tað er blivið nú.

Fyri ikki so langari tíð síðani stóðu nøkur gomul hús og neyst á staðnum, og hesi blivu ikki nýtt serliga nógv. So bleiv gjørt av at bróta hetta niður og gera tað til eitt lítið savningsstað, sum tað er blivið til í dag, og hetta kemur eisini til stóran gagn fyri vestanstevnuni um vikuskiftið.

Nógv ymisk tiltøk vera nevniliga á skránni á Stakka. Leygardaginkl. 14.00 – beint áðrenn kappróðurin – verður stevnan sett á Stakka, og tað er Mina Reinert, sum fer at seta stevnuna. Leygarkvøldið verður so midnáttarsamkoman á skránni við sangi og øllum tí, sum har til hoyrir. Og her fer Magni Arge, stjóri á Atlantsflog at bera fram røðu.

Sunnudagin verður ein fólkafundur á skránni, sum eisini verður á Stakka, og tað serliga við hesum fundi er, at Petra Joensen úr Gásadali fer at hava fundin. So økið á Stakka er ikki bert gjørt fyri at fríðka um bygdina. Hetta økið verður nevniliga í allar hægstu grad nýtt í samband við sjálva stevnuna.

Men tá setan, midnáttarsamkoma og fólkafundur ikki er á skránni, so er økið eisini gott at hugna sær í saman við familju, vinum og kenningum á vestanstevnu. Økið er ikki bara vakurt og hugnaligt. Tað liggur eisini sera væl fyri mitt í vikuni, og sum skilst á fólki í Sørvági, so er hetta besta staðið í bygdini hvat viðvíkur veður og vindi.



*Vakra staðið á Stakka í Sørvági verður karmur um bæði setanina, midnáttarsamkomuna og fólkafundin*

*Mynd: Teitur Joensen*